## Stjóri í SAS gevst



Forstjórin í teirri donsku deildini av flogfelagnum SAS, Susanne Larsen, fer nú úr starvinum og felagnum. Tann 59 ára gamla Susanne Larsen hevur arbeitt hjá SAS í 40 ár, og sjálv heldur hon, at tað er hóskandi hjá sær at gevast, nú felagið er í so ógvusligum rembingum. Børsen skrivar, at starvið sum forstjóri í SAS Danmark verður niðurlagt, nú Susanne Larsen gevst. Flemming Jensen, sum umsitur SAS-virksemið í Kastrup, skal røkja uppgávurnar, sum fráfarandi stjórin hevur havt.

## Japanar nokta at gevast

Japanska stjórnin kunngjørdi í morgun, at hon fer ikki at akta møgulig boð frá altjóða hvalaveiðinevndini at steðga vísindaligu stórhvalaveiðini í Suðurhøvum, sjálvt um japanar sleppa at veiða hval í egnum sjógvi afturfyri. Japanska stjórnin sigur, at tann vísindaliga veiðan í Suðurhøvum heldur fram, og at málið er at veiða allar teir 985 stórhvalirnar, sum skipinmi hava fingið loyvi at veiða. Shigeru Ishiba, fiskimálaráðharri, sigur tó, at stjórnin er til reiðar at viðgera øll uppskot um hvalaveiði.

# Nýggir vinnubygningar

**Um ikki so langa tíð er væntandi, at fýra nýggir vinnubygningar fara at standa á nýggja ídnaðarøkinum hjá Nes kommunu við Rætt. Ein bygningur stendur liðugur, ein er reistur og hin triði verður nú eisini reistur, umframt at MJ Saltsøla ætlandi skal byggja á nýggja vinnuøkinum**

VINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Havnalagið í Nes kommunu er ivaleyst tað havnalag í Føroyum, sum er mest broytt seinastu árini.

Hyggja vit at myndum, sum eru tiknar fyri kreppuna fyrst í nítiárunum og samanbera tær við myndir, sum eru tiknar í dag, sæst, at havnalagið og vinnuøkið kring havnina hevur verið fyri sera stórum broytingum – og í stórari menning.

Ein orsøk til hesa menning er, at tey, sum í síni tíð stóðu aftanfyri Fiskamarknað Føroya, gjørdu Toftir til miðdepil fyri sølu og landing av fiski.

### Nógv virksemi

Umframt fiskamarknað og landingarmiðstøð, er eisini Kassamiðstøð á økinum sunnanfyri Toftagjógv. Beint heimanfyri Toftagjógv er bygningurin hjá Snodd, har skrivstovuvirksemi og goymsla er. Síðan kemur bygningurin hjá Valhalla, ið er eitt pakkivirki, sum útflytir feskan fisk. Útflutningurin av feskum fiskavørum fer fram um farleiðina hjá Fresh Link, ið hevur skrivstovu í bygninginum hjá Snodd og hevur tvær avskipingar av Toftum við farmaskipinum Silver Fjord um vikuna.



*Símun Johannesen, borgarstjóri*

Miðskeiðis millum gamla vinnuøkið kring Toftagjógv og nýggja vinnuøkið við Rætt, kemur fiskavirkið hjá Faroe Seafood, ið er fyrrverandi Nykur. Hetta er saltfiskavirki, ið upprunaliga læt upp sum vanligt fiskavirki longu í 1969.

Aftrat nevndu vinnubygningur millum fyrrverandi Nyk og Toftagjógv, kemur so eisini smiðjan, sum SD Beding átti. Haldur Vang, timburmeistari, hevur í heyst keypt henda bygning til sítt timburvirksemi.

### Nýggj vinna

Áhugin fyri at byggja upp vinnuvirksemi í Nes kommunu hevur verið so mikið stórur seinastu árini, at kommunan hevur planerað eitt nýtt og stórt vinnuøki innanfyri Oyrarnar – ella við Rætt, tey rópa.

Á hesum øki hevur fyritøkan Sea Star longu bygt sín fyrra bygning av tveimum, sum stóð liðugur einaferð í fjør summar. Í hesum bygningi er framleiðsla av betong elementum, umframt at felagið eisini hevur bilaverkstað í einum parti av bygninginum. Sea Star stoypti fundamentir til tveir bygningar um nøkulunda somu tíð, og



# Eingin minking í skattainntøku

**Símun Johannesen, borgarstjóri í Nes kommunu, sigur, at enn hevur kommunan einki merkt til, at skattainntøkurnar eru minkaðar. – Men vit eru spentir eftir at síggja, hvussu inntøkurnar hava verið í januar, sigur hann**

SKATTUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Borgarstjórin í Nes kommunu kann fegnast um, at skattainntøkurnar hjá kommununi higartil hava hildið.

- Í 2008 hildu skattainntøkurnar væl og virðiliga. Vit fingu umleið 3 miljónir krónur meira inn í skatti, enn vit høvdu væntað, tá vit løgdu fíggjarætlanina fyri farna ár.

Hann vísir á, at metta skattainntøkan fyri 2008 var 31,8 miljónir krónur, men tá samanumkom gjørdist hon 34,9 miljónir krónur við partafelagsskattinum, sum kemur teir seinastu mánaðirnar av árinum.

- Soleiðis hildu skattainntøkurnar í 2008 væl og virðiliga, leggur hann aftrat.

Símun sigur, at enn veit hann ikki, hvussu januar mánaði í ár hevur vignast, og tí bíðar hann spentur eftir, hvat úrslitið verður.

- Vit kunnu vænta, at inntøkurnar ikki økjast, men heldur minka, soleiðis sum tíðirnar eru.

Hann vísir á, at skattainntøkan var javnt størri allar mánaðirnar í fjør – undantikið í august, tá hon var væl minni. Annars vóru eingi stór sveiggj.

- Eg havi skilt, at fleiri kommunur høvdu lægri skattainntøku í august í fjør enn sama mánaða árið fyri, og eingin veit, hvør orsøkin er til tess.

Borgarstjórin fegnast annars um gongdina í kommununi, har alt virksemið, sum verið hevur, framvegis er í gongd.

- Vit fegnast eisini um, at fólk hava mótt upp á at byggja sær betri umstøður á nýggja vinnuøkinum hjá okkum við Rætt.

Í sínum stilla sinni sigur borgarstjórin seg vóna, at fíggjarkreppan, sum eisini hevur við sær, at keypiorkan í vinnuni er lítil í løtuni, fer at hasa av, tá árið í ár fer at líða.

- Eg havi einki at hava tað í, men onkusvegna kundi líkt verið til, at henda kreppan ikki verður so drúgv.

Hann vísir á, at fiskiskapurin hjá partrolarunum hevur verið góður, og vónir eru um, at toskurin fer at mennast aftur.

- Samanumtikið haldi eg ikki, at kreppan hesaferð kann samanberast við kreppuna, vit høvdu fyrst í nítiárunum, sigur Símun Johannesen, borgarstjóri.